# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 28.01.2019*

**Bygdaráðsfundur: 28.01.2019 kl. 18.00 til kl.18.20**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd:** | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Selma Hansen. skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 1/2019 Ársroknskapur 2017 – Kongshavnar Havn**
J.nr. 08.14.00-Ø09-1-17
**Málslýsing**
Ársroknskapurin fyri 2017 hjá Kongshavnar Havn er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

**Tilmæli**
Á fundi 23.01.2019 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við ársroknskapinum, fyri 2017, hjá Kongshavnar Havn soleiðis, sum hann er uppsettur.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 2/2019 Rakstraræltlan 2019 – Kongshavnar Havn**
J.nr. 08.14.00-Ø09-3-18
**Málslýsing**
Rakstrarætlanin fyri 2019 hjá Kongshavnar Havn er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

**Tilmæli**
Á fundi 23.01.2019 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við rakstrarætlanini, fyri 2019, hjá Kongshavnar Havn soleiðis, sum rakstrarætlanin er uppsett.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 28.01.2019*

**Mál nr. 3/2019 Lántøka - Nes Kommuna**
J.nr. 00.34.00-Ø20-1-19

**Málslýsing**
Í fíggjarætlaninum fyri 2018 og 2019, er samtykt, at taka lán uppá ávikavist 7 og 18 mió. kr. fyri til at fíggja íløgur hjá kommununi.

Nes Kommunu hevur fingið tilboð uppá lán á 25 mió. kr., har lánið kann útgjaldast leypandi, í mun til fíggjarliga tørvin.

**Tilmæli**
Fíggjarnevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Bank Nordik.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 4/2019 Umsókn um byggiloyvi til sethús**
J.nr. 02.34.02-P20-44-16
**Málslýsing**
Tann 26. november 2018 søkir Norðsetur, vegna Jóhan Petur Petersen og Mary Jansdóttir Petersen, um byggiloyvi. Húsini eru í 2 hæddum. Kjallarahædd og stovuhædd, har tekjan er mønureist.

Staðsetingin er norðasta stykki við Lýðarsvegin, matr.nr. 474z, sum er niðanfyri vegin.

**Tilmæli**
Tekniska nevnd mælir til at geva byggiloyvi. Tó skal viðmerkjast í byggiloyvið at, sambært serstøku ásetingina fyri hesa útstykking, er mest loyvda byggihædd 4m, mált upp frá miðum vegi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 5/2019 Umsókn um byggiloyvi til sethús**
J.nr. 02.34.02-P20-41-16
**Málslýsing**
Tann 23. desember 2018 søkja Rúni Person Jacobsen og Maria Marcusardóttir Jacobsen um byggiloyvi á matr.nr. 746ø við Høganesvegin.

Húsini eru eini eitt-planshús við slættari tekju. Bilhúsið, sum er leyst frá sethúsinum, er somuleiðis í einari hædd við slættari tekju. Staðsetingin er norðast við Høganesvegin omanfyri vegin.

**Tilmæli**
Tekniska nevnd mælir til at geva byggiloyvið við tí treyt, at hallið á innkoyringin til bilhúsið ikki verður meira enn 150 m‰.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd vær einmælt samtykt.

**Mál nr. 6/2019 Umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygningar**
J.nr. 02.34.02-P20-42-16
**Málslýsing**
Tann 4. januar kemur umsókn frá KBH um byggiloyvi til tveir íbúðarbygningar, á Kneysum, Toftir. Talan er um íbúðarbygningar, sum KBH byggir fyri Bústaðir.

Bygningarnir eru í 2 hæddum, og hava lága mønureising. Teir standa leysir av hvørjun øðrum, nakað forskotnir í lendinum. Tann norðanfyri lægri, og tann sunnnfyri hægri.

Bygningurin norðanfyri hevur pláss fyri 10 íbúðum og bygningurin sunnanfyri fyri 8 íbúðum.

Íbúðirnar eru í 2 støddum, 70m² og 48m². Har aftrat er goymslurúm á 3m², og altan til hvørja íbúð.

**Tilmæli**
Tekniska nevnd mælir til at geva byggiloyvið sambært viðløgdu skjølum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 7/2019 Umsókn um uppískoytisstykki**
J.nr. 05.04.00-P20-2-19
**Málslýsing**
Í desember 2018 spyr Petur Gaardlykke, um tað er møguleiki at víðka um grundstykkið rundan um hansara hús á Heygum.

Verandi stykki er bert 165m², men har er pláss fyri víðkan. Tekniska deild hevur gjørt eitt uppskot, har stykkið verður víðkað við 110m², sum Petur Gaardlykke hevur góðtikið.

**Tilmæli**
Tekniska nevnd mælir til at geva loyvið sambært uppskoti.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 28.01.2019*

**Mál nr. 8/2019 Umsókn um uppískoytisstykki**

J.nr. 05.04.00-P20-1-19

**Málslýsing**

Tann 6. januar søkir Høgni Harryson um loyvi at keypa eitt jarðarstykki sunnanfyri hús hansara á Brekkukletti, sum hann ætlar at nýta til urtagarð. Nes kommuna er eigari av lendinum, sum er 322m² til støddar (vegleiðandi).

**Tilmæli**

Tekniska nevnd mælir til at umsøkjarin fær loyvið til at leiga lendið. Tvs. nýtslurættin til urtagarð við tí, sum hartil hoyrir.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 9/2019 Tilboð uppá serflutning – Lukkað mál**

J.nr. 16.09.15-P27-1-19